# mikil samstundis



*Tað er ein heilt fantastisk kensla, tá tú liggur mitt á stóra havinum. Tú ert fullkomulia einsamallur og í friði, sigur Patrick, sumj í ´bara 7,5 metra langa báti sínum hevur siglt tvørtur um Atlantshavið*



leysir aftur í bræði. So lítið sá lugari út til at vera.

## Altíð siglt

Niðri úr lugarinum fortelur Patrick, at hann hevur siglt alt tað hann minnist. Heima í Maine hava tey altíð átt bátar og hava siglt, so tað er higani at stóri áhugin fyri sjólívinum stavar.

Ofta verður sagt um fólk, sum dáma stórar bilar og nógva ferð, at tey hava bensin í blóðinum. Hetta sigi eg við Patrick og spyrji hann, um hann hevur sjógv í blóðinum.

Flennandi svarar hann, at tað torir hann ikki at avnokta, og fer so undir at greiða frá, hvussu tað er at liggja púra einsamallur mitt á Atlantshavinum.

– Tað er ein heilt fantastisk kensla tú hevur, tá tú liggur mitt á stóra havinum. Rundan um teg er bara sjógvur, og tú ert fullkomiliga einsamallur og í friði.

– Men tá aldurnar eru stórar og veðrið leikar í, er tað viðhvørt, at eg kenni meg ógvuliga lítlan. Samstundis kennir tú teg eisini øgiliga valdsmiklan, tí at tú í tínum lítla báti flýtur oman á hesum ógvusligu aldunum, og ger av kósina hjá hesum lítla bátinum, sigur Patrick Reilly og trampar niður á dúrki, fyri at vísa okkum, at hesin báturin hevur verið ígjøgnum eitt sindur á hvørjum.

Nú Patrick er í Føroyum hevur hann ferðast eitt sindur kring oyggjarnar í bátinum. Hann hevur enn ikki endaliga avgjørt nær hann fer víðari til Skotlands, men ætlar hann sær at steðga nakrar dagar aftrat.

– Veðrið hevur alt siga nær eg fari, men nú havi eg so leigað mær ein bil í nakrar dagar, og ætli mær koyra ein túr í landinum, áðrenn eg fari avstað aftur, sigur ævintýrarin úr USA, sum ein av komandi døgunum vendir stevnið út úr Vágsbotnið við kós ímóti Skotlandi.

*vakti*

## Vitjaði føroyskan bátasmið



*Tað vakti serligan ans hjá Patrick, tá hann slapp at vitja hjá Terja Jakobsen, bátasmiði*

Grace, sum báturin hjá Patrick Reilly eitur, sær ikki út av nógvum, millum nakrar av hinum fremmandu seglbátunum í Vágsbotni. Akkurát tí eru tey kanska fleiri, sum eru steðgaði á og hava forvitnast til henda fitta bát.

- Eg havi fingið fleiri áhugaverd prát her í Vágsbotni, og so hava tey eisini hjálpt mær við at funnið fram til nøkur nøvn og nakrar adressur, eg annars ongantíð hevði fingið, fortelur Patrick Reilly.

Tað er nevniliga soleiðis, at Patrick Reilly er sera áhugaður í bátasmíðing, og tí hevur hann spurgt fleiri, um nøvn á onkrum bátasmiði her.

Týsdagin hevði hann so fingið avtalu í lag við Terja Jakobsen í Kollafirði, sum hevur tað sum yrki at smíða bátar. Terje Jakobsen leggur stóran dent á, at hansara bátar eru gjørdir eftir gamla sniðinum, og tað er nakað, sum hóvar Patrick Reilly væl.

Umframt at sigla, so skrivar Patrick Reilly eisini onkra grein nú og tá, sum síðani verður útgivin í ymsum bløðum. Nú hann er her ætlar hann sær at skriva eina grein um føroyska bátin, og tí passaði tað ómetaliga væl, at hann nú fekk tikið nakrar myndir, meðan Terje legði seinastu hondina á bátin, sum verður burturlutaður á ólavsøku.

Terje og konan fortaldu Patrick eina rúgvu, og í dag fer Patrick at vitja ein annan, sum kann fortelja honum meiri um føroyska bátin.

- Ja, tað verður neyvan nakar trupulleiki hvat tilfarinum viðvíkur, sigur Patrick Reilly flennandi, og leggur so aftrat, at so er bara at vóna, at onkur tímur at geva greinina út.